# Torkil Skála 65 ár

Hósdagin 12. mars fylti Torkil Skála í Havn 65 ár.

Torkil er havnarmaður, sonur Honnu, f. Thorkildshøj, av Nesi, og Óla Christian Skála, keypmann í Havn.

Eftir lokið realprógv fór hann á studentaskúla og tók studentsprógv í Hoydølum í 1963. Síðan var hann vikarur við Sankta Frans Skúla í tvey ár.

Eina tíð var Torkil sjómaður, hann sigldi við línubátunum Mai og Oyrarsker. So lá leiðin til Danmarkar, har hann tók læraraprógv frá Esbjerg Seminarium í 1971.

Heimafturkomin fekk hann starv á Venjingarskúlanum í Havn, har hann var lærari til 1977, tá hann fekk starv á Eysturskúlanum, sum varð hansara lívsstarv. Hann hevur verið á ymiskum skeiðum á Fróðskaparsetri Føroya innan sítt starvsøki, serliga innan søgu og undirvísingarlæru. Hann var limur í Tórshavnar Skúlaráð frá 1976-84.

Innan ítróttin hevur fótbólturin havt hansara stóra áhuga. Hann var formaður í HB eitt tíðarskeið og er enn í dag ein av trúgvu gomlu HB-stuðlunum. Hann hevur verið virkin bridgespælari, og sangur hevur eisini hansara stóra áhuga, hann hevur t.d. sungið í Tórshavnar Manskóri.

Torkil er giftur við Esther, f. Justinussen, ættað úr Leirvík, og eiga tey børnini Eirik og Hervør.

*- red*



# Heinina Joensen 80 ár



Týsdagin 24. mars fyllir Heinina Joensen í Sandavági 80 ár. Hon var gift við Mouritsi Joensen í Sandavági, sum doyði í 1989. Síðan hevur hon livað einsamøll í húsi. Hon er røsk og klárar seg sjálvan.

Henni dámar væl at ganga túrar, eisini dámar henni ógvuliga væl at fara til fimleik/rørslu saman við eldri fólki í Vágum tvær ferðir um vikuna.

Hon hevur fýra børn, 12 barnabørn og 7 langommubørn. Henni dámar væl at vera saman við familjuni, hevur áhuga í hvussu vit hava tað. Vit hava havt stóra gleði av hennara hjálpsemi gjøgnum árini. Hon fylgir væl við í tí sum rørist í samfelagnum og serliga ítróttinum, eisini dámar henni væl at koma á møti og í kirkju. Børnini saman við øllum familjum teirra ynskja henni hjartaliga tillukku á 80 ára degnum og vit gleða okkum til hendan dag.

Føðingardagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum í Sandavági leygardagin 21. mars, har øll eru vælkomin at heilsa upp á hana.

# Svenning og Poul á Malta

Í sambandi við trúboðaraferð í Danmark vitja Svenning av Lofti og Poul Færø á Malta í Hirtshals í vikuskiftinum.

Leygarkvøldið 21. mars kl.19.30 og sunnukvøldið 22. mars kl. 18.00 verða eykamøtir á Malta, har Poul Færø og Svenning av Lofti koma at tala, og Marner av Lofti og Hans Jákup á Lava koma at spæla og syngja.

Svenning og Poul eru fyri aðru ferð á trúboðaraferð í Danmark innanfyri tveir mánaðir. Onkur spurdi, hví teir komu so skjótt aftur, og tá segði ein, at tað var tí, at teir føldu, at tað var nakað eftir at gera. Spurdir um tað er so svara teir játtandi.




Svenning og Poul eru ikki einans á prædikuferð á flatlondum, men eisini fyri at vitja føroyingar, sum eru fastbúgvandi í Danmark; og fastbúgvandi føroyingarnir í Danmark eru í túsundatali, so her kann verða nógmikið at tríva í hjá einum andaligum hirða. Teir hava seinasta hálva ári ferðast nógv saman til møtir runt í Føroyum, og teir savna nógv fólk har teir koma.

*Poul Jóhan Djurhuus*
*Gjaranes@post.olivant.fo*

*Svenning av Lofti og Poul Færø*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Herborg Strøm** fer til gravar úr Vágs kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, sum vilja minnast Herborg kunnu lata eldrasambýlinum í Vági eina gávu.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 20. mars verður Tordis Poulsen á Válinum 90 ár. Leygardagin 21. mars millum kl. 15 og 18 bjóðar hon til ein kaffimunn inni á Fjørukrónni.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 24. mars verður Heinina Joensen, Sandavágur, 80 ár. Dagurin verður hildin 21. mars í Meinigheitshúsinum frá kl 17.

**50 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. mars fyllir Jóngerð Midjord 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldsundi frá klokkan 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 21. mars kunnu Niklas og Jensia Joensen í Kollafirði hava gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, undir Heygnum, á Todnesi 17 frá klokkan 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

**Brúdleyp**
25. apríl 2009 kl. 12 giftast í Betesda, Klaksvík: Elsebeth P. Eyðunsdóttir Jacobsen, Svínoy og Marni Steinberg, Klaksvík. Veitslan verður á hotel Norð kl. 16. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á tlf. 226916 (Elsebeth) ella tlf. 220061/ 287307 (Marni) innan 31. mars 2009.

**Brúdleyp**
Flaggdagin 25. apríl giftast Annika Soll, Sørvágur, og Sámal Kristian Jacobsen, Tórshavn. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 14.00 og veitsla fyri innbodnum verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00.

**Prógv**
6. februar fekk Sanna Klein av Skála prógv sum cand.mag. í bókmentafrøði frá Syddansk Universitet í Odense.

# Sangløta í Ebenezer



Leygarkvøldið 21. mars skipar Sangkórið í Ebenezer fyri sangløtu í Ebenezer.

Á skránni eru sangir, sum kórið hevur vant hetta sangárið, og einstakir sangir, sum kórið hevur sungið seinastu árini. Í fleiri av sangunum syngja eisini solistar saman við kórinum.

Felagssangur verður eisini á skránni á sangløtuni, sum byrjar kl. 20.00.